


www.oljan.fo

**Jan Müller** 10 - 12 - 2012

# Faroe Petroleum borar aftur í Norra

Faroe Petroleum hevur aftur sett borin í norsku undirgrundina. Hesaferð er talan um Rodriguez leitibrunnin, sum felagið eigur 30% av. Leitimiðið liggur á Haltenbankanum út fyri Norðurnoreg. Tað liggur 4 km frá Tyrihans framleiðslueindini og 8 km frá Mariufundinum, sum Faroe Petroleum gjørdi í 2010 og seldi víðari til norska Petoro. Boringin er mett at vara í 70 dagar. Tað er Winthershall, sum er fyristøðufelag við 50%, og síðani hevur Centrica 20%. Borað verður á 291 metra dýpi og borast skulu umleið 4000 metrar. Boripallurin Transocean Artic verður brúktur.